# Bilar

Nr. 58 • mikudagur • 22. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

**FAKTA**

**Mercedes-Benz A 170 5/h**

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,5 litur bensin 95 hk |
| 0-100 km/t | 12,7 sek |
| Bensinnýtsla | 16,1 km/l |
| Dekkstødd | 185/65-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 384,0 cm |
| Breidd | 176,0 cm |
| Hædd | 159,0 cm |
| Eginvekt | 1.210 kg |
| Viðførisrúm | 435 litrar |
| Prísur | kr. 280.000,- |
| Søluumboð | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 313666<br>www.ivan.fo |



*Mercedes-Benz eru komnir á marknaðin við nýggjum A-klassa, sum nú er ein størri bilur enn forgangarin*



# Mercedes-Benz við nýggjum A-klassa

**Mercedes-Benz eru komnir á marknaðin við nýggjum A-klassa, sum nú er ein størri og rúmligari bilur enn forgangarin og fæst við bæði 3 og 5 hurðum. Kvaliteturin í kabinuni er nú tann sami sum í størru Mercedes bilunum**

**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Fyrr vóru Mercedes-Benz persónbilarnir stórir luksus- og sportsbilar og hýruvognar, sum eru kendir fyri slitstyrki og kvalitet, men seinnu árini eru teir eisini farnir at kappast í minni klassum.

Mercedes-Benz eru komnir á marknaðin við nýggjum A-klassa, sum nú er ein størri og rúmligari bilur enn forgangarin, ið fyrstu ferð kom á marknaðin í 1997. Hesin fæst nú við bæði 3 og 5 hurðum og er 23 cm longri og 4,5 cm breiðari við 14,5 longri aksilfrástøðu enn forgangarin.

Eins og forgangarin hevur hesin dupultan botn, soleiðis at við ein frontalan samanstoyt, verður motorurin trýstur inn undir bilin. Hetta gevur somu trygd sum í størri bilum. Ein annar fyrimunur er, at nógv av tí sum annars tekur pláss í kabinuni verður goymt undir dúrkinum.

Hóast dúrkið og setrini eru hægri uppi, er tyngdipunktið lágt, og bilurin sera stabilur at koyra. Við heilt nýggjum hjólupphangum og elektromekaniskari servostýring er talan um ein bil við góðum og tryggum koyrieginleikum og skivubremsum aftan og framman.

Mercedes-Benz A er ein 5-persónabilur við elegantum og smartum designi, eisini innan við eini eyðkendari Mercedes kabinu og sera góðum beinplássi bæði framman og aftan. Viðførisrúmið er 435 litrar, og við baksetrunum niðri verður tað 1.485 litrar, ið má sigast at vera stórt í mun til støddina á bilinum.

A-klassin fæst við fleiri ymiskum bensin- og dieselmotorum. Bensinmotorarnir byrja við 1,5 litur við 95 hk til 2,0 litur turbo við 193 hk. CDI dieselútgávurnar hava allir 2,0 litur motor við ávikavist 82, 109, og 140 hk.

Av standardútgerð kunnu vit nevna t.d. aircondition við pollenfiltri, aktivar nakkapútur, bremsuassistent (BAS) og elektroniskt stabiliseringsprogram (ESP), elsíðuspegl við hita, hita í forsetrunum, hita í sprinklaradysunum og multifunktiónsratt.

Prísirnir byrja við kr. 252.000,-. Bilurin kann síggjast og roynast hjá Ivan Johansen Bilum.



*Mercedes-Benz A 170 innan. Kvaliteturin í kabinuni er nú tann sami sum í størru Mercedes bilunum*